# SELJA STÓR

**SØLA** Klokkan er farin av níggju henda mikudagin í farnu viku, og nú er ikki leingi til dagsins uppboðssøla skal byrja. Men her á Landingarmiðstøðini í Sørvági er eingin panikkur at hóma. Her er alt væl lagt til rættis og fyrireikað. - Vit eru í øllum førum til reiðar, sigur Wentzel Mouritsen, formaðurin á miðstøðini

Snorri Brend

**Sørvágur:** – Ja, nú verður spennandi at vita, um nakrir keyparar eru harúti, sigur Wentzel róligur.

Her er veruliga skil og sómi á øllum, hóast menn hava úr at gera: Úr skipslastunum kemur tann dýrabara veiðan uppá land. Á bryggjuni taka menn ímóti teimum hundraðtals kørunum, áðrenn trukkarnir flyta tey undir tak.

Inni á Landingarmiðstøðini verður eisini eitt stórt arbeiði gjørt, til tann týdningarmikla partin sum nú stendur fyri framman: Sjálv uppboðssølan.

– Í gjár seldu vit tvey tons. Meginparturin fór til Fiskavirkið í Gøtu og til Nevið í Runavík, har tað verður skorið til flak, greiðir Wentzel frá.

Tá gjørt varð upp henda mikudagin í farnu viku - 27. november 2010 - vórðu 4.302 kilo seld, meginparturin toskur.

**» Vit byrjaðu at landa Drelnes tíðliga í morgun og síðani Vesturskin. Annars landaðu vit Vesturvarða seinnapartin í gjár**

## Sløg og støddir

Hóast stutt tíð er eftir til sjálv sølan skal byrja her í morgun, er kortini gjørt eitt stórt arbeiði frammanundan.

Longu dagin fyri byrjaðu teir fyrstu bátarnir at boða frá, at teir ynsktu landing. Ein av uppgávunum hjá Wentzeli er at skipa soleiðis fyri, at fólk eru at landa allar hesar bátarnar.

Sambært yvirlitinum frá Fiskamarknaðinum vóru 10 bátar og løgdu veiðuna upp til søluna í gjár. Av hesum vóru níggju teirra úr Sandoynni.

Av tí at rættiliga væl av útróðrarfiski kom upp á land í gjár, má og skal hann verða skildur sundur í fiskasløg og støddir, áðrenn sjálvt uppboðið byrjar - tað er: longu klokkan níggju í morgun.

Skipanin er soleiðis, at Fiskamarknaðurin ringir til Wentzel klokkan 8, og so gevur hann teimum eina meting av tí, sum teir hava til dagsins sølu. Klokkan 9 verða so tølini send umvegis telefaks til teir, og síðani koma tølini á telduna og á alnetið.

– Tá klokkan er 10, eru øll tølini komin út á heimasíðuna hjá Fiskamarknaðinum. Og so kann sølan byrja, greiðir Wentzel frá.

Arbeiðið hjá teimum á Landingarmiðstøðini er síðani at fáa fiskin út til teirra sum hava keypt hann, so skjótt sum gjørligt.

## Telda – ikki menn

Treytin fyri, at ein søla sum henda á Landingarmiðstøðini kann virka, er sjálvandi hon, at fiskur yvirhøvur kemur uppá land her í Sørvági.

Henda mikumorgunin varð tíðliga farið til verka á havnarlagnum. Longu klokkan 6 vóru teir fyrstu menninir klárir til at fáa tær fyrstu lastirnar uppá land.

– Vit byrjaðu at landa garnabátin Drelnes tíðliga í morgun og síðani Vesturskin. Annars landaðu vit Vesturvarða seinnapartin í gjár, vísir Wentzel á. - Og nú er so klárt at selja fiskin.

Aðrastaðni, til dømis á uppboðssøluni í Skagen, verða sølurnar avgreiddar á annan hátt enn her. Har møta fiskakeyparar upp fyri



**» Í gjár seldu vit tvey tons. Meginparturin fór til Fiskavirkið í Gøtu og til Nevið í Runavík, har tað verður skorið til flak**



**UPSI**

*Fyrr var upsin álitið hjá mongum skipum og virkjum. Í løtuni fæst lítið og einki av hesum fiskaslagnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*